LANDSSKJALASAVNIÐ
National Archive

Stutt og greitt um royndar-kanningar av skjalasavnsútgávum

Dátur og skjøl frá almennum fyrisitingarligum KT-skipanum, ið skulu varðveitast fyri eftirtíðina, skulu avhendast til Landsskjalasavnið í einari skjalasavnsútgávu. Skjalasavnsútgávur skulu gerast eftir reglunum í kunngerð um KT-avhendan av skjalasavnsútgávum til Landsskjalasavnið nr. .... frá dd.mm.åååå. (hereftir kunngerðin). Í sambandi við móttøku nároynir Landsskjalasavnið allar skjalasavnsútgávur nágreiniliga fyri at tryggja, at dátur, bygnaður og skjalfestan er í samsvari við kunngerðina og tað ávísu avhendanarásetanina, ið er lýst um innihaldið av einari ávísari skipan.

Hendan vegleiðingin vendir sær til myndugleikar og veitarar av KT-skipanum, sum gera eina ávísa framleiðslu og avhending av einari skjalasavnsútgávu til Landsskjalasavnið. Í vegleiðingini verður – í skema – greitt frá mannagongdini í sambandi við móttøku og royndarkanning fyri at gera skiljandi hvat hendir, frá tí at tú avhendar eina skjalasavnsútgávu, til hon verður góðkend og goymd í goymsluskipanini hjá Landsskjalasavninum og Ríkisskjalasavninum.

Í vegleiðingini verður m.a. svarað uppá:

- Hvat hendir, tá Landsskjalasavnið tekur ímóti skjalasavnsútgávuni
- Hvussu ein royndarkanning hjá Landsskjalasavninum og Ríkisskjalasavninum gongur fyri seg
- Hvussu long tíð tað tekur, áðrenn svar kann væntast
- Hvat svar ein kann vænta
- Hvat hendir, tá ein skjalasavnsútgáva verður góðkend

Sum uppískoyti til hesa vegleiðing til royndarkanning av skjalasavnsútgávum í Landsskjala-savninum og Ríkisskjalasavninum hava vit gjørt eitt yvirlit yvir vanligastu feilirnar, ið føra við sær, at skjalasavnsútgávur ikki kunnu góðkennast beinan vegin. Yvirlitið inniheldur eisini leiðbeining um, hvussu feilirnir kunnu rættast. Vit mæla til, at tú eftirkannar hendan listan nágreiniliga og rættar hesar feilirnar, áðrenn tú avhendar eina skjalasavnsútgávu, fyri at gera mannagongdina fyri royndarkanning so einfalda og skjóta sum gjørligt.

Hvat hendir í sambandi við eina avhending?	**Hvat kann avhendandi myndugleiki/veitari gera?**
Landsskjalasavnið kvittar fyri móttøkuna við einum e-posti, sum verður sendur til tann avhendandi myndugleikan við einum avriti til møguligan veitara. Legg merki til, at samskiftið skal sendast til høvuðspostkassan, ikki til navngivnar persónar.	Ger nýtslu av standard fylgisseðlinum, sum Landsskjalasavnið/Ríkisskjalasavnið hevur gjørt – tað ger okkara arbeiði nógv lættari í mun til kvittanarskrivið, skráseting vm. Fylgiðsseðilin kann heintast á okkara heimasíðu www.lss.fo Fylgisseðilin kann heintast beinleiðis frá okkara heimasíðu www.lss.fo

Vit gera í fyrstu atløgu eina viruskanning	Syrg fyri, at antivirusforrit altíð eru dagførd
Vit koyra eina sokallaða initialkanning/test, som kannar eftir um "kontrolsummer" ið eru givin í fileIndex.xml í skjalasavnsútgávuni svara til konstrolsummina í teimum fílum, ið innganga í skjalasavnsútgávuni. Um so er, at ósamsvar er, kunnu vit senda skjalasavnsútgávuna aftur til avsendaran uttan nærri test og kanningar. Minst til, at brøv og viðmerkingar, spurningar og svar til testverkstaðið hjá Landsskjala-savninum/Ríkisskjalasavninum, skal sendast við e-posti. Pappírsbrøv mugu ikki viðleggjast einari avhending, og talgildug brøv til testverkstaði hjá Landsskjalasavninum/ Ríkisskjalasavninum mugu ikki liggja á avhendingarmiðlinum.	Frem sjálvur eitt endaligt eftirlit av skjalasavnsútgávuni, áðrenn hon verður send. Um so er, at tað henda broytingar í onkrum av fílunum í skjalasavnsútgávuni í samband við ymiskar rættingar, er tað av týdningi, at tú minnist at uppdatera kontrolsummin á fílinum. Um so er at tað eru broytingar, kanst tú møguliga brúka funkuna í testforritinum ADA, fyri at gera ein nýggjan filIndex.xml við nýggjum kontrolsummum. Hav tó í huga, at hettar kann taka langa tíð. Um so er, at talan um at gera broytingar, er tað – sum oftast - skjótari bara at útskifta teir umráðandi kontrolsummirnar.
Hvussu langa tíð tekur tað, áðrenn eitt svar kemur?	
Tá initialkanningin er gjøgnumført, fer skjalasavnsútgávan í eina bíðirøð, til tað er tíð til at testa og kanna hana. Vit testa skjalasavnsútgávur í tí rekkjufylgju, vit taka ímóti teimum. Eftirsum Ríkisskjalasavnið – ið er partur av avhendanarmannagongdini – fær sera nógvar avhendingar, skal roknast við eina bíðitíð, áðrenn vit/tey senda svar uppá kanningina. Hvussu langa tíð testin/kanningin tekur, er eisini tengt at hvussu stór skjalasavnsútgávan er, og hvussu kompleks ella torgreidd hon er.	
Hvussu gongur kanningin fyri seg?	
Ein av okkara kanningarstarvsfólkum fremur ein sokallaða "autotest", tvs. eina kanning við royndarkoyringarforritinum ADA. Hendan autokanning endar í einum sokallaðum "testlogs", sum er grundarlagið fyri einum aftursvari, sum kanningarstarvsfólkið sendir til avhendandi myndugleikan eins og møguliga eisini til KT-skipanarveitara.	Royn sjálvur at koyra eina ADA-testkanning og rætta til í skjalasavnsútgávuni áðrenn avhendan. Koyr testina sum administrator, tá ADA annars kann geva misvísandi úrslit. ADA kann takast niður frá heimasíðuni hjá Ríkisskjalasavninum, sum vit hava eina samstarvsavtalu við. Sí her: www.sa.dk – Aflevering til arkivet – statslige myndigheder – ADA – Testprogram til arkiveringsversioner Legg merki til at tað leypandi verða gjørdar feilrættingar v.m. í ADA.

	Tí er ikki vist, at tann versiónin av ADA, ið tú kanst taka niður frá heimasíðuni, er sama útgáva, sum Ríkisskjalasavnið ella Landsskjalasavnið brúkar til at testa/royndarkoyra skjalasavnsútgávuna við.
Eftir at ein "autotest" er gjørd ger test-starvsfólki eina "sjónbæra test", sum millum annað umfatar tey tjekkpunkt, sum eru í fylgiskjølunum til hesa vegleiðing.	Far ígjøgnum listan yvir vanligar feilir, og ger tær neyðugu betringarnar og rættingar áðrenn avhendan til Landsskjalasavnið/Ríkisskjalasavnið.
Er testkanningin bert ein syntaktisk eftirmeting um kunngerðin verður yvirhildin?	
Nei, testirnar verða gjøgnumførdar fyri at fáa eina yvirordnaða meting av, um umskifti til skjalasavnsútgávuna er gingið gott. Vit testa eisini fyri evnum og vandamálum, ið ikki neyðturviliga eru beinleiðis skeiv í mun til kunngerðina, men sum allíkavæl eru ansingarpunkt. Dømi: Blankar ella tómar síður, herundir blonk fyrsta síða. Tað er sjálvandi ikki ólógligt at hava blankar (heilt hvítar ella heilt svartar síður) í skjalasavnsútgávuni, men um so er at tað eru nógvar, gevur tað allíkavæl høvi til spurningar, sum eru íkomnir í samband við framleiðslu av skjalasavnsútgávuni, ella um tað í grundini vísir innihaldið í hesi skipan. Í samband við testingina við ADA-forritinum í Ríkiskjalasavninum, eru tað ymiskar test í kunnu sláast til og frá. Ymiskar av teimum innganga í okkara test, nevniliga: Fyri tabellir: • Lyklatest (bæði primerlyklatest og fremmandalyklatest) Fyri skjøl: • Samantrýsting/Kompression • Blankar fyrsta síður • Blonk skjøl Haraftrat kann teststarvsfólki í ávísum førum hava tørv fyri at testa fyri um tað finnast "persónlig tags" í tiff-fílum, eins um har eru skjøl, ið eru sera stór í skjalasavnsútgávuni. Hesar testkanningar verða bert brúktar, um so er, at vit leita eftir frágreiðingum upp á útbreiðslu av ónatúrliga stórum og plásskrevjandi skjølum.	Finn út av - møguliga við hjálp av ADA - um tað kunnu væntast spurningar viðv. ov nógvum blonkum skjølum, skjølum uttan samangreiping til mál, osv., og kanna, hví hettar er so. Tað kann verða ein stór hjálp, um tú skrivar hesi vandamál í einum fylgibrævi ella – um so er at tað er avtalað – í einum skjali í kontekstdokumentatiónini í skjalasavns-útgávuni.

Hvat er eitt aftursvar?	
Eitt aftursvar er eitt bræv, har Landsskjalasavnið/Ríkisskjalasavnið gjøgnumgongur úrslitið av testini, og sigur hvat skal gerast um, soleiðis at skjalasavnsútgávan kann broytast. Eitt aftursvar inniheldur: • Lýsing av feilum, sum skulu rættast • Viðmerkingar um hvørjar broytingar Ríkiskjalasavnið/Landsskjalasavnið møguliga hevur gjørt í metadátum ella bygnaði í sambandi við test. Í fyrsta umfari verða ongar rættingar gjørdar, men tað verður neyðugt í avmarkaðum førum at broyta navngeving av einstøkum fílum, rætta skemavísingar ella rætta dátutýpur osv. • Ymiskir spurningar Legg merki til, at eitt aftursvar ikki altíð er ein endaligur listi yvir allar feilir. Í ávísum førum eru tað bygnaðarligir trupulleikar í skjalasavnsútgávuni, sum skulu loysast,áðrenn ein verulig test kann gjøgnumførast. Í øðrum førum er talan um trupulleikar, sum koma so ofta fyri, at aftursvarið bara gevur dømi upp á, hvat ið skal loysast. Tað kann til dømis verða manglandi lýsingar av kolonnum ella tabellum ella manglandi dokumentatión av koduvirðum.	
Hvat hendir í samband við eina góðkenning?	
Tá ein skjalasavnsútgáva eftir Landsskjalasavnsins/Ríkisskjalasavnsins meting livur upp til krøvini í kunngerðini, verður hon send víðari til okkara goymslu, har hon verður goymd í fleiri eintøkum á fleiri miðlum og á fleiri støðum í Føroyum og Danmark. Tá avhendanin til goymilagur er nøktandi framt, sendur Landsskjalasavnið/ Ríkisskjalasavnið sendir eitt góðkenningarbræv til myndugleikan og møguliga til veitaran. Ikki fyrr enn góðkenningarbrævið er móttikið, kann myndugleikin strika tær dátur, sum innganga í skjalasavnsútgávuni.	

LANDSSKJALASAVNIÐ
National Archive